# Hvalbingar bjóða fólki at royna sín kropp og sítt dirvi



*Hetta er húsið fyri sunnan í Lítlu Dímun. Beint yvirav húsinum sæst tað gamla hellið, sum hevur verið álitið í langtyvir hundrað ár*



*Her eru rakstrarmenninir komnir upp á oynna fyri sunnan og nú sita teir og fáa sær ein bita og njóta tað fantastiska útsýnið, áðrenn teir fara at reka*



*Inni í sjálvum hellinum, har teir plagdu at búleikast, áðrenn húsini vórðu bygd. Í hellismunnanum stendur Óli Jensen, formaður í Lítlu Dímun*

**Hvalbingar bjóða nú Lítla Dímun fram til ferðafólk, ið vilja hava eitt upplivilsi fyri lívið, sum tey neyvan fáa nakra aðrastaðni í verðini og har tey fáa roynt seg**

SERMERKT FERÐAMÁL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tey, sum veruliga vilja bjóða sær sjálvum av og royna síni mørk, fáa nú ein møguleika, sum tey ikki fáa oftani í lívinum.

Og tað eru hvalbingar, sum nú geva tykkum møguleikan.

Lítla Dímum er minsta oyggj í Føroyum. Hon er eisini einasta óbygda oyggj í Føroyum. Men tað er ikki so løgið, tí hon er eisini tann minst innbjóðandi og bara at síggja myndir hagani er nóg mikið til at fáa tað at øra fyri eygunum á teimum flestu.

Kortini eru tað mong, sum hava ein dreym um at sleppa í Lítlu Dímun. Men tað er altso ikki bara sum at siga tað tí tað gerst bara í allarbesta veðri.

Men nú fara hvalbingar at bjóða Lítlu Dímum fram sum ferðamál og sostatt geva teir ferðafólki ein einstandandi møguleika at fáa eitt upplivilsi, sum tey ikki fáa nakra aðrastaðni í verðini.

Teir, sum eiga Lítlu Dímun, hava sett Signar Olsen og Róin Schrøter at arbeiða víðari við hesi ætlanini.

Teir báðir siga, at teir hava merkt ein størri og størri áhuga fyri at sleppa út í Lítlu Dímun, men higartil hava skipaðar útferðir í Oynna ikki verið gjørdar.

Í hesum døgum verður arbeitt við at fyrireika tiltakið og fyribils er ætlanin at gera tríggjar túrar í summar.

Teir tríggir túrarnir verða 17. juni, umframt 1. og 22. juli.

Tey, sum vilja sleppa við, kunnu velja ímillum at fara í oynna við tyrlu, ella við báti upp á tann góða gamla mátan.

Men túrurin 1. juli verður nakað fyri seg, tí tá kunnu tey, sum tora, sleppa at síga niður av renningini niður á helluna og so í bátin, tá ið farið verður av aftur oynni. Hetta er eitt sig uppá einar 50 metrar.

Á teimum túrum, sum verða gjørdir við báti, er í mesta lagi pláss fyri 17 fólkum á hvørjum túri og hesin túrurin kostar 22.100 krónur tilsamans.

Við tyrluni er pláss fyri 10 fólkum og tann túrurin kostar ímillum 33.000 krónur og 40.000 krónur, alt eftir um flogið verður umvegis Havnina ella umvegis Hvalba.

Her er talan um túrar, har farið verður í Oynna tíðliga á morgi og heimaftur seinnapartin ella um kvøldið.

Fyrireikararnir siga, at hetta kann tykjast dýrt, men teir ásanna, at tað kann valla vera bíligari, tí túrurin er dýrur at fyriskipa við tað, at bæði bátur ella tyrla skulu brúkast, samstundis sum nógvar fyrireikingar skulu gerast og ferðaleiðari skal við.

– Men eru tað bólkar, sum vilja sleppa í oynna aðrar tíðir, ella sum vilja gista í oynna, ella sum yvirhøvur hava serlig ynski, eru vit altíð til reiðar at tosa við um tað, fyri at gera serligar avtalur um túrar, leggja Róin Schrøter og Signar Olsen dent á.

Teir siga, at teir hava longu fyrispurningar frá bólkum, sum vilja sleppa at gista í Lítlu Dimum og tað eru tað góðir møguleikar til,t í tað eru tvey hús harúti.

– Men vit hava eisini fyrispurning frá einum bólki, har tey vilja heilt aftur til tað heilt gamla og har tey tí vilja sleppa at gista í tí gamla hellinum, sum vit hava brúkt í øldir, til vit fingu húsini, siga teir báðir.

Í øðrum húsinum í oynni er pláss fyri átta fólkum og í hinum húsinum er pláss fyri 25 fólkum. Men luksus er tað ikki, tí øll mugu hava soviposa við.

Vatn er ikki í húsunum, men ein kelda, Sørinarkelda, er í Lítlu Dímum, so reint vatn fæst altíð.



### Seta ikki lívið í vága

Róin Schrøter og Signar Olsen siga, at í Oynni eru fleiri møguleikar.

Hjá teimum, sum fara út við tyrlu, er talan um ein róligan túr av toppinum niður á eina breiða rás sum gongur runt um alla oynna.

– Her er gott at ganga, men tað ber eisini til hjá teimum meiri djørvu at fara aðrar vegir, har tað ikki er so heilt gott at ganga, uttan at tað á nakran hátt er vandamikið.

Túrurin við báti er eitt sindur meiri krevjandi, tí tá skal gangast upp á oynna, men hóast tað er bratt, er gott at ganga, tí góðir veirar eru gjørdir at halda sær í og nýggir stigar at ganga ígjøgnum.

Teir báðir fyrireikararnir siga, at staðkendur ferðaleið-